# Fólkaatkvøða um kommunusamanlegging

**Einaferð í vár verður væntandi fólkaatkvøða í kommununum í Norðureysturoy og Norðurstreymoy fram við Sundalagnum um kommunusamanlegging**



*Borgarstjórin í Gjáar Kommunu gongur inn fyri eini samanlegging av kommunum í Norðureysturoy og Norðurstreymoy eystantil til eina stóra kommunu*

KOMMUNUMÁL
*Edvard Joensen*

Bygdarráðini í øllum kommununum í Norðureysturoy, uttan Eiðis Kommunu, og kommunum í Norðurstreymoy fram við Sundalagnum hava gjørt av at skriva út fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging. Atkvøðan verður væntandi einaferð næsta vár.

Arbeitt hevur verið fram í móti at gera eina stóra kommunu í Norðureysturoy og Norðurstreymoy, sigur Sofus Johannesen, borgarstjóri í Gjáar Kommunu. Allar kommunurnar í økinum, uttan Eiðis Kommuna, eru við í ætlanini.

Reglur eru gjørdar fyri umboðan í einum komandi kommunustýri, eins og gjørt er av, at fólkaatkvøða skal skrivast út um ætlanina. Eisini hava kommunurnar bundið seg til at fylgja úrslitinum av fólkaatkvøðuni, sigur Sofus Johannesen.

Saksunar Kommuna hevur longu gjørt av at leggja saman við Hvalvíkar Kommunu, sum er við í ætlanini um stóru samanleggingina, og á tann hátt koma saksuningar eisini við, um ætlanin verður veruleiki, sigur Sofus Johannesen.

# Bíligt sjónvarp við Gjógv

**Gjáar Kommuna fer í næstum at leggja sjónvarps- og internetkaðal til hvørt hús í bygdini. Møguleiki verður at fáa 22 sjónvarpsræsur umframt SvF og internet**

FJARSKIFTI
*Edvard Joensen*



*Gjáarfólk fáa felags parabolskipan, sum bíliga gevur teimum møguleika fyri at fáa 22 sjónvarpsræsur umframt Sjónvarp Føroya inn í stovuna*

Gjáar Kommuna hevur bílagt útgerð til felags parabolskipan til øll húsarhald í bygdini. Væntandi verður farið undir arbeiðið at leggja kaðal heilt skjótt, sigur borgarstjórin.

Sogfus Johannesen, borgarstjóri í Gjáar Kommunu, sigur, at samtykt er í bagdarráðnum við Gjógv at leggja kaðal frá eini felags parabolantennu til øll hús við Gjógv.

Kaðalin gevur fólki møguleika fyri at síggja 22 sjónvarpsræsur umframt Sjónvarp Føroya. Sjónvarpsgjaldið fyri SvF er fastlagt, meðan allar hinar 22 sjónvarpsræsurnar kunnu fáast fyri 90,- krónur um mánaðan, sigur Sofus Johannesen.

Tað er upp til fólk sjálv, um tey seta stikkið í, sigur hann. Kommunan ger íløguna í útgerðina, og so er lætt at fylgja við, hvør bindur í. Kravt verður so inn hareftir, sigur borgarstjórin.

Aðrir fyrimunir við hesi skipanin fram um fleiri aðrar parabolskipanir, sigur Sofus Johannesen vera, at tað ber til at síggja fleiri ymsar ræsur í sama húsi samstundis. Tað velst bara um talið á sjónvarpstólum, sum inni eru. Hvørt tólið kann taka sína rás, og ikki sum við vanligum parabolmótakarum, har bara ein rás verður tikin inn í senn.

Umframt verður so eisini møguleiki fyri at fáa internetsamband, sigur Sofus Johannesen.

Tá slepst undan tí mangan svikaliga uppringda sambandinum, sum í dag er.

Ikki er óvanligt í dag, at tá ein hevur fingið internetsamband um telefonina, verður ein blakaður út aftur eftir stuttari tíð. Hetta endurtekur seg javnan og er bæði irriterandi og ikki heilt kostnaðarleyst heldur, sigur borgarstjórin við Gjógv. Tað kostar nevniliga 40 oyru, hvørja ferð ringt verður upp.

Tað verður ikki tað stóra arbeiðið av at leggja kaðalin, sigur Sofus Johannesen, tí tá SEV í 1989 gróv allar kaðalar í bygdini niður, vórðu samstundis løgd rør at draga júst slíkar kaðalar ígjøgnum.

# Nýggj avtala um Felagsskúlan

**Kommunurnar í samstarvinum um Felagsskúlan á Oyrarbakka hava gjørt nýggja avtalu um skúlan**

SKÚLASAMSTARV
*Edvard Joensen*



*Nýggjur sáttmáli er gjørdur um Felagsskúlan á Oyrarbakka*

Nýggjur sáttmáli er gjørdur millum kommunurnar, sum samstarva um Felagsskúlan á Oyrarbakka.

Sáttmálin líkist heilt nógv tí, sum galdandi var, til nýggja fólkaskúlalógin kom í gildi. Bert eru onkrar ávísar dagføringar gjørdar, sigur Sofus Johannesen, borgarstjóri í Gjáar Kommunu, sum er við í skúlasamstarvinum um Felagsskúlan á Oyrarbakka.

So tað fer ikki at ávirka skúlan nakað sum helst, at ein nýggjur sáttmáli nú er gjørdur, sigur hann.

Seinnu tíðina hava næmingar úr Funnings- og Elduvíkar Kommunum gingið í Felagsskúlanum á Oyrarbakka, uttan at hesa kommunur tó formliga hava verið við í samstarvinum.

Tær báðar kommunurnar hava fingið tilboð um at koma upp í samstarvið, sigur Sofus Johannesen. Tað kostar teimum einki at koma uppí, sigur hann, og skúlin er niðurgoldin.

Enn er tó einki svar komið frá Funnings Kommunu, men Elduvíkar Kommuna hevur boðað frá, at hon ikki ynskir at koma upp í samstarvið.

Hvussu framtíðin so verður hjá næmingunum úr teimum báðum kommununum, fara tær kommunurnar, sum við eru í samstarvinum so at taka støðu til, sigur borgarstjórin við Gjógv.

# Nøkur fá færri um flogvøllin

**Samlaða ferðafólkatalið um flogvøllin í Vágum lækkaði í fjør við 0,7 prosentum í mun til í fyrraárið**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Hóast eitt lítið sindur færri ferðafólk fóru um flogvølliní fjør enn í fyrraárið, varð ein vøkstur á høvuðsrutunum, sum eru Danmarkarruturnar, sigur leiðslan á flogvøllinum í tíðindaskrivi nú beint eftir nýggjár.

Minkingin stendst av, verður sagt í tíðindaskrivinum, at ferðslan á rutunum til á frá Stórabretlandi er minkað munandi. Hetta kemur av, at eingin frálandavinna var undir Føroyum í fjør, verður sagt. Minkingin á hesum rutunum var ikki minni enn 22,4 prosent.

Hinvegin er ein munandi vøkstur staðfestur á Noregsrutunum. Har hava 23,1 prosent fleiri feðrafólk valt at ferðast til og úr Føroyum umvegis flogvøllin i Vágum.

Á Danmarkarleiðunum, har nógv flest fólk ferðast, er eisini ein vøkstur í fjør í mun til í fyrraárið. Tað ferðaðust 2,7 prosent fleiri fólk til og úr Danmark í 2002 í mun til 2001.

Tað verður eisini flogið millum Vágar og Ísland, og har er ferðingin støðug í mun til undanfarin ár. Tað ferðaðust umleið hálvtíggjundatúsund fólk loftvegis millum Føroyar og Ísland í fjør, og tað er á leið sama tal sum í fyrraárið.

Tilsamans 156.895 fólk ferðaðust í fjør um flogvøllin í Vágum móti 158.056 í fyrraárið. Hesi nýttu 5.280 komur og fráferðir, sum eru umleið 10 prosent færri enn árið fyri.

Aftur her er tað frálandavinnan, sum stendur fyri minkingini. Tilsaman 8,4 porosent færri komur og fráferðir vóru í samband við hesa vinnu, meðan rutuferðir, charter- og taxaflúgvingin vaks við 3,3 prosentum, sigur leiðslan á flogvøllinum í Vágum í tíðindaskrivinum.



# Vit vilja sjálvi skapa okkara ungdómsmentan

**Hvørt mikukvøld hittast útvið 70 tannáringar í hølunum hjá KFUM í Havn, at syngja og hava tað stuttligt saman. Saman kalla tey seg Sound of Glory , og Í summar skulu tey vera við á stórari stevnu í Prag**

TEN SING
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Fýra av limunum í ungdómskórinum Sound of Glory. Frá vinstru er tað Durita Dahl Andreassen, Malan Jensen, Meinhard Arge Jensen og Beinta Haraldsen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í summar skal kórið Sound of Glory taka lut á stórari stevnu fyri ung við tilknýti til KFUM-K felagsskapir úr øllum Evropa. Talan er um eitt sonevnt Ten Sing kór, har luttakararnir hittast fyri at syngja, men har dentur harumframt verður lagdur á at hava tað stuttligt og hugnaligt saman á kristnum grundarlag.

– Eg vil ikki kalla okkum fyri eitt gospelkór, tí okkara skrá fevnir um fleiri sløg av tónleiki. Men vit virka innan kristnar rammur, og hava t.d. eina lítla andakt aftur við hvørjari venjing, greiðir Meinhard Arge Jensen frá. Sjálvur er hann kórleiðari hjá Sound of Glory, og Sosialurin hitti hann í hølunum hjá KFUM, saman við teimum trimum Duritu Dahl Andreassen, Malan Jensen og Beintu Haraldsen, ið allar eru við í kórinum.

Hetta slagið av kóri er væl kent, millum annað úr Norra, og tað var eisini haðani, at íblásturin kom til at stovna føroyska kórið fyri góðum trimum árum síðan, greiða tey frá. Í dag hevur Sound of Glory umleið 70 kórlimir í aldrinum 13-19 ár. Tey hava millum annað sungið í kirkjum og samkomum í høvuðsstaðnum, í Eysturoynni, í Klaksvík og í Suðuroynni, og eisini hava tey havt tvær konsertir í Norra. Eisini plaga tey at syngja til konfirmantaveitsluna í KFUM, og hetta plagar somuleiðis at vera eitt gott høvi at finna nýggjar limir til kórið.

– Tað er eingin treyt at fólk skulu duga at syngja so ella so, men umráðandi er heldur, at fólk tíma og dáma at syngja, greiða tey frá.

Í summar ætla tey sær at fara út um landoddarnar við kórinum. Leiðin gongur fyrst til Norra, og síðan til kekkiska høvuðsstaðin Prag, har tey skulu taka lut í stóra tiltakinum "YMCA Europe 2003", ið fer fram dagarnar 3.-9.august. YMCA er enska styttingin fyri KFUM. Hesar dagar hittast umleið 8000 fólk, ið hava sína gongd í KFUM felagsskapum kring alt Evropa, til eitt stórt tiltak, har dentur verður lagdur á konsertir, drama, kjakløtur, bíbliutímar o.a. Áðrenn tey fara til Prag skulu tey vitja eitt Ten Sing kór á Stavanger-leiðini í Norra, og har skal kórið eisini hava tvær konsertir.

Men hóast konsertirnar eru ein partur av virkseminum hjá ungdómskórinum, so eru tær kortini ikki týdningarmiklasti parturin, eru tey fýra samd um.

– Vit eru eitt ungdómskór, men vit vilja eisini royna at skapa okkum eina felags ungdómsmentan, har vit gera ymiskt saman, m.a. hava ymisk tiltøk saman, og vit leggja eisini stóran dent á gott samanhald, greiða tey frá.

### 60 fólk til Prag

Longu nú er greitt, at tey vera umleið 60 í tali, tá leiðin í summar gongur til Prag. Í hesum sambandi ætla tey sær at hava fleiri tiltøk fyri at savna inn pengar. Fyrsta tiltakið verður í dag, leygardagin, tá kórlimirnir fara at at savna fløskur í allari Havnini. Seinnapartin leygardagin, millum klokkan trý og fimm, ætla tey sær at ganga hús úr húsi í øllum høvuðsstaðnum og spyrja fólk, um tey hava tómar fløskur standandi, ið tey vilja lata kórinum.

– Vit hava onga hóming av, hvussu nógv hetta fer at geva, men hetta er so ein roynd, sigur Meinhard Arge Jensen, og greiðir frá royndunum hjá einum norskum kóri, ið tey kenna, sum fekk umleið 15.000 krónur inn við einum líknandi tiltaki.

– Høvdu vit klárað at fingið tað sama, so hevði ikki verið so galið, eru tey fýra samd um.

Seinni í vetur og í vár ætla tey sær at skipa fyri fleiri øðrum tiltøkum fyri at útvega pengar til ferðina.

# Norrøna liðug til tíðina

**Arbeiðið við nýggju Norrønu gongur væl, og skipið verður latið eigarunum 20.marts. Hjá Smyril Line merkja tey stóran áhuga fyri skipinum, bæði í Føroyum og uttanlands**

NÝBYGGING
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*– Arbeiðið við nýggju Norrønu gongst sum ætlað, og vit fáa skipið 20.marts, sigur Jóannes á Váli, annar av stjórunum í Smyril Line*

20.marts verður dagurin, tá nýggja Norrøna verður latin Smyril Line av Flenderverft skipasmiðjuni í Lubeck í Týsklandi.

– Arbeiðið gongur væl, og skipið verður liðugt til tíðina. Tað sigur Jóannes á Váli, annar av stjórunum í Smyril Line. Hann greiðir frá, at øll stórarbeiði, m.a. við maskiuni og við tí elektriska, eru komin undir land, og eftir restar bara innrættingin umborð, útluftningin, umframt onnur smærri arbeiði. Umleið 10. februar er ætlanin at fara fyrsta tekniska royndartúrin við skipinum, ið tá veruliga skal standa sína roynd.

### Prísurin heldur

Nú Norrøna er um at vera liðug, kann Jóannes á Váli staðfesta, at prísurin fyri skipið fer at halda. Sáttmálabundni prísurin fyri nýggja, stásiliga skipið er 710 milliónir krónur.

Í summar kom Flenderverft skipasmiðjan, ið byggir Norrønu, í fíggjarligar trupulleikar, fór seinni í gjaldssteðg, og tað er hon enn. Men tungi fíggjarligi burðurin hjá skipasmiðjuni hevur kortini ikki darvað arbeiðinum at smíðja nýggju Norrønu. Tó er framtíðin hjá týsku skipasmiðjuni framvegis óviss.

### 100.000 ferðafólk

Eftir ætlan skal nýggja Norrøna í sigling, beint eftir at hon er latin eigarunum tann 20.marts. Tó er enn ikki tikin endalig støða til, hvørt skipið fyrst skal ein framsýningartúr, áðrenn tað fer í regluliga sigling. Í ár eru páskirnar um miðjan apríl, og tá vænta tey hjá Smyril Line nógv ferðafólk við nýggja skipinum.

Í juni kemur týska fótbóltslandsliðið til Føroya at spæla, og hetta er ein góður møguleiki hjá Smyril Line at marknaðarføra nýggja skipið í Týsklandi. Hjá Smyril Line hava tey enn einki yvirlit yvir, hvussu nógvir fótbóltsáskoðarar koma hendaveg til dystin við Norrønu, men skipið fer úr Hanstholm leygardag og verður á Havnini mánadag, sum dysturin verður spældur mikudag, og tískil skuldi verið lagamanni hjá týskum fótbóltsáskoðarum at nýtt hesa farleið.

Síðsta summar førdi Norrøna umleið 75.000 ferðafólk í Norðuratlantshavi. Jóannes á Váli sigur, at nú nýggja skipið verður tikið í nýtslu, vænta tey eina øking uppá 30 prosent í ferðafólkatalinum.

– Málið er at nýggja skipið helst skal flyta 100.000 ferðafólk í summarsiglingini, sigur Jóannes á Váli.

Stjórin í Smyril Line vil ikki seta tal á, hvussu nógv ferðafólk nýggja skipið skal flyta, fyri at tað skal mala runt fíggjarliga. Men hann sigur tó so mikið, at talið helst skal vera nakað omanfyri tey 75.000 ferðandi, ið Norrøna flutti síðsta summar.